# Fyrrverandi bossar onga viðmerking

**Hvørki Sølvi Reinert Hansen ella Heðin Mortensen hava hug at gera viðmerkingar til tulkingina hjá sitandi ÍSF-forseta um rúsdrekka og ítrótt**

Leo Poulsen

Tað er greitt, at semja er ikki í ÍSF um tulkingina hjá formanninum í sambandi við øllýsingina hjá Okkara á HB- og Neistaleikbúnunum. Tað hevur formaðurin í Svimjisambandinum greitt boðað frá.

Hinvegin vilja undanfarnu ÍSF-forsetarnir ikki gera viðmerkingar til málið.

Sølvi Reinert Hansen, ið sat undan Petur Elias Petersen, sigur, at málið ongan tíð var uppi at venda í hansara forsetatíð, og tí veit hann ikki, hvørja støðu hann hevði tikið.

Hann heldur tað ikki geva nakra meining, at hann nú boðar frá, hvørja støðu hann í givnum føri hevði havt til eitt slíkt mál.

Heldur ikki Heðin Mortensen, ið sat sum ÍSF-forseti í út við 30 ár – og eisini var forseti, tá umrødda stevnumið varð orðað og samtykt – vil blanda seg í aktuella málið.

Tað mest áhugaverda er kortini, hvat restin av stjórnini í ÍSF heldur um tulkingina hjá forsetanum, og tað fæst greiði á tá næsti stjórnarfundur verður einaferð í komandi mánað.




*Til FM-dystirnar hevði mansliðið hjá Neistanum gjørt avtalu við Okkara bryggjarí um lýsing á leikbúnanum*




*Tulkingin av reglunum í »Stevnumið um rúsdrekka og ítrótt« er sambært Petur Elias Petersen hon, at eitt lítið logo (hjá Okkara) hevur tálmandi ávirkan – og minni enn einki logo...*

# Taka »Okkara-málið« upp á stjórnarfundi

**Øllýsingar á leikarabúnum eru á veg at gerast góðkendar av ÍSF, men Petur Elias Petersen, ÍSF-forseti, sigur nú, at málið verður tikið upp á fyrstkomandi stjórnarfundi**

Leo Poulsen

Tað eru ójavnar meiningar um lýsingina hjá Okkara bryggjaríi á leikbúnunum hjá HB. Christian Andreasen, forseti í Fótbóltssambandinum, segði við Rás2 og Sosialin, at hann fór saman við nevndini í FSF at hyggja upp á málið, meðan Jón Hestoy, formaður í Svimjisambandinum, segði, at tað hevði ikki komið upp á tal innan hansara samband at loyvt slíkum lýsingum.

ÍSF-forsetin, Petur Elias Petersen, hevur hinvegin valt at tulka reglurnar í »Stevnumið um rúsdrekka og ítrótt« soleiðis, at av tí at Okkara er eitt lítið og nýtt bryggjarí, er tað í lagi at lýsa við logo'inum hjá fyritøkuni.

Hann segði við Rás2 í gjár, at hann ikki kann taka støðu til ein hypotetiskan spurning um, hvørt hann hevði viðmælt einari lýsing frá Tuborg ella Carlsberg.

Fyri at kasta meiri við á bálið hevur Petur Elias Petersen undan páskum givið Neistanum grønt ljós at brúka sama Okkara-logo á búnunum hjá mansliðinum í sambandi við FM finaludystirnar.

Men ÍSF-forsetin segði eisini við Rás2 í gjár, at hann fór at taka málið upp í stjórnini.

– Málið er so nógv blást upp í miðlunum, at tað er rættast at vit taka tað upp á fyrstkomandi stjórnarfundi, segði Petur Elias Petersen.

Men sum skiltist á ÍSF-forsetanum kann talan væl blíva um at linka reglurnar soleiðis, at tað fór at gerast púra greitt, at slík logo sum Okkara saktans kunnu brúkast sum lýsingar á leikbúnum undir ÍSF.

Tá verður so spurningurin, um pengarnir telja meira enn fyrilitið fyri børn og ung, sum hava leikararnar sum sínar fyrimyndir.